KPMG

Grannskoðarar við royndum og ungir grannskoðarar

Orsakað støðugt vaksandi virksemið og av tí at tveir av okkara grannskoðarum fara at fáa sær víðari útbúgving hjá ávíkavist KPMG í Keypmannahavn og KPMG í Madrid, hava vit brúk fyri at seta fleiri grannskoðarar í starv til heystar.

Starvslýsing
Arbeiðið fevnir um grannskoðan, roknskaparhjálp og eina rað av øðrum tænastum til føroyskar og útlendskar privatar fyritøkur innan flest allar vinnugreinar, eins og til kommunur og almennar stovnar v.fl.

Grannskoðarar við royndum og/ella við ástøðiligari útbúgving

Útbúgvingin
Umframt at fáa hollar arbeiðsroyndir gjøgnum tað dagliga arbeiðið, skulu tey, sum verða sett í starv, nema sær viðari ástøðiliga útbúgving.

Harumframt verður talan um innanhýsis undirvísing, bæði hjá okkum og hjá KPMG í Danmark.

Umsøkjarin
Roknað verður við, at umsøkjarar hava útbúgving sum siviløkonomar (HA), hava lokið HD-prógv ella cand.merc.aud., og eru áhugaðir at halda fram við at útbúgva seg.

Eisini er tað eitt krav, at viðkomandi er fryntligur og fyrikomandi, og til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, serliga fyrru helvt av árinum.

Framtíðarmøguleikar
Møguleiki er fyri at nema sær tær praktisku og ástøðiligu royndirnar, sum skulu til fyri at gerast statsautoriseraður grannskoðari.

Ungir grannskoðarar

Útbúgvingin
Umframt at fáa hollar arbeiðsroyndir gjøgnum dagliga arbeiðið, skulu okkara starvsfólk nema sær ástøðiliga útbúgving við at fylgja HD-undirvísingini á Føroya Handilsskúla. Harumframt verður talan um innanhýsis undirvísing, bæði hjá okkum og hjá KPMG í Danmark.

Umsøkjarin
Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava lokið HH-prógv, og verða áhugaðir í framhaldandi útbúgving.

Eisini er tað eitt krav, at viðkomandi er fryntligur og fyrikomandi, og er til reiðar at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð, serliga fyrru helvt av árinum.

Framtíðarmøguleikar
Aftaná lokið HD-prógv er møguleiki fyri at halda áfram at nema sær ástøðiligu útbúgvingina cand.merc.aud., sum er neyðug fyri at gerast statsautoriseraður grannskoðari.

Umsóknin
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving verður at senda okkum skjótast gjørligt ella í seinasta lagi innan 15. mai 2000.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Mirjam Haraldsen á telefon 34 34 34.

KPMG í Føroyum er føroysk ogn burturav. Samstundis eru vit limir í KPMG International, sum er eitt tað størsta grannskoðanarsamtakið í heiminum.
Okkara mál er at veita tænastur innan grannskoðan, roknskaparhjálp, figgjarstýring, skatt og mvg v.m. á hægsta góðskustigi.
Í Føroyum hava vit ein góðan og breiðan kundaskara bæði innan handil, idnað, peningastovnar og figgjarstovnar eins og kommunur og landið.
Støðuga útbúgvingin av starvsfólkunum og góðskustýring okkara ger okkum væl fyri at loysa tær uppgávur, sum verandi og komandi kundar, bæði føroyskir og útlendskir, ynskja loystar av okkum.
Í løtuni starvast 22 fólk hjá felagnum.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn, Tel 34 34 34, Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo, E-mail: kpmg@kpmg.fo

kpmg • 31 69 11

Áminning um at lata ársroknskapir inn til Skráseting Føroya

Øll feløg skrásett hjá Skráseting Føroya, eiga at lata ársroknskap fyri 1999 inn til Skráseting Føroya, **í seinasta lagi 1. august 2000**, um tey hava almanakkaári› sum roknskaparár, jvb. § 62 í ársrokn-skaparlógini.

Feløg i› hava forskoti› roknskaparár skulu lata roknskapin inn til skrásetingina í seinasta lagi 7 mána›ar eftir at roknskaparári› er enda›.

Um feløg ikki lata roknskap inn til tí›ina, hevur Skráseting Føroya heimild til at senda feløgini í Skiftirættin til tvingsilsavtøku ella at áleggja limunum í feløgunum bøtur, jvb. § 64 í ársroknskapar-lógini.

Skráseting Føroya tann 11.05. 2000

Kristin Balle

Prógv

Jógvan Pauli Christiansen, Skáli, hevur lokið yrkisútbúgving sum maskinsmiður. Læruplass: Skipasmiðjan á Skála.
Sámal Petur Jacob Mittelstein, Skopun, hevur lokið yrkisútbúgving sum bilmekanikari. Læruplass: Nordbil, Tórshavn.

Brúdleyp

Leygardagin 20. mai kl. 17 giftast í Christianskirkjuni Martina Steffensen og Ólavur Hansen, Klaksvík.
Veitslan verður hildin í Skálanum fyri innbodnum kl. 19. Vælkomst verður kl. 22.

Leygardagin 10. juni kl. 14 giftast í Berøa, Saltangará, Randi Hansen av Toftum og Símun Jóannesarson Hansen úr Saltangará. Veitslan verður hildin í Leguhúsinum í Nesvík kl. 18.30.
Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 448231, 447864 ella 211449 áðrenn 28. mai.

Leygardagin 17. juni kl. 13.30 giftast í býráðssalinum í Havn Laila Joensen, Kollafjørður og Leif av Reyni, Tórshavn.
Tey, sum ynskja at gleða brúðarparið við at koma, kunnu siga frá í seinasta lagi 7. juni á tlf. 421310 ella 317899.

Silvurbrúdleyp

Mikudagin 17. mai hava hjúnini Fríða á Rógvu Eysturtún og Hans Eysturtún, silvurbrúðleyp.
Dagurin verður hildin í Lysvænget 74, 5500 Middelfart, Danmark, fyri børnum, svigarbørnum og ommu- og abbabørnum.

Mikudagin 24. mai hava hjúnini Emly og Harald Joensen, Miðvágur, silvurbrúðleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum 27. mai kl. 19.
Tey, ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið við at koma, kunnu siga frá á tlf. 333263 ella 332275 áðrenn 16. mai.

Týsdagin 6. juni hava hjúnini Frígerð og Jonhard Mouritsen, Djúpagilsvegur 6, Hoyvík, silvurbrúðleyp. Dagurin verður hildin í Sjónleikarhúsinum í Havn fríggjadagin tann 9. juni kl. 19.
Tey, ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið við at koma kunnu siga frá á tlf. 315154 áðrenn 1. juni.

75 ár

14. mai fyllir Mimi Hansen, Fuglafjørður, 75 ár.

Konfirmatiónir

14. mai verður Eyðfid Johannesen, dóttir Elisabeth og Steingrím E. Johannesen úr Skopun, konfirmerað í Ellebæk kirke í Holsterbro.
Adr. Midgården 9, 1.tv. 7500 Holsterbro.

Dýra biðjudag 19. mai kl. 10.30 verður Heine Mortensen Krog, sonur Gunnleyg Mortensen og Ejgil Krog fermdur í Kvaglund kirke í Esbjerg.
Adr. Fyrrelunden 7, 6705 Esbjerg Ø.
skal í blaðið leygardagin 14.

Leygardagin 20. mai verður Henry Jarnskor, sonur Tinu og John Paula Jarnskor, konfirmeraður í Sct. Nicolai Kirkju í Rønne.
Adr. Pæretræsdalen 34, 3700 Rønne, Bornholm.

21. mai skulu konfirmerast í Horne kirke Rutt Joensen dóttir Randi og Páll Joensen, ættaði úr Lopra.
Adr.: Stendyssevej 54, Horne, 9850 Hirtshals.
Barbara Joensen dóttir Lindu Joensen, ættað úr Lopra og Johannes Magnussen, Tvøroyri.
Adr. Skrivervænget 5 Horne, 9850 Hirtshals

21. mai verður Ása Ingrid Poulsen, dóttir Borgarhjørt og Jákup Poulsen, konfirmerað í Vamdrup kirke.
Adr.: Tyrings Ager 45B, 6580 Vamdrup, Danmark.

nøvn nú nøvn nú nøvn nú nøvn nú

Heilsanir

Gó›a Elia
Hjartaliga tillukku vi› tínum 1 ára fø›ingardegi tann 14. mai, somuleiøis takka vit tær fyri okkara ríkasta ár.
Bestu ynskir mamma og babba

Gó›a Linda
Tillukku vi› 4 ára degnum. Nú ert tú blivin ordiligani stór, ha? Skikka tær nú ordiligt og hav ein stuttligan fø›ingardag.
Heilsan Immi og Herthaomman

Gó›i Christian gubbi
Hjartaliga tillukku vi› degnum 9. mai. Heilsa ommu, abba, gummu og didduni, okkum leingist eftir tykkum! Eisini ein seinka› heilsan til Høgna gubba.
Ynskja Jónsvein , Rúnar og Ey›in

Hey Hey Linda!
Tillukku vi› degnum. Nú ert tú 4 ár. Tíverri kann eg ikki koma su›ur, tí tú veit, hvussu illani mær dámar at sigla og koyra bil.
Heilsan Pippi (mjav mjav)

Gó›i Tóri-gubbi
Hjartaliga tillukku á 25 ára degnum i› var tann 10.5.
Ynskir Jóhan

Gó›i Martin
Hjartaliga tillukku vi› 5 ára degnum 14. mai.
Ynskja mamma og babba

Gó›a fitta Ása!
Hjartaliga tillukku vi› 10 ára degnum 3.5.
Ynskja mamma, babba, Julius og Kristina

Gó›a Hilma
Hjartaliga tillukku vi› 3 ára degnum tann 12.5.
Heilsan vit øll, Silja

Halló Richard!
Hjartaliga tillukku vi› tí runda degnum og takk fyri hugnaliga samveru á Ei›i.
Ynskir myndafelagin

Gó›a Elia
Okkara lítla sólstrála, hjartaliga tillukku vi› 1 ára degnum. Jesus pápi signi teg.
Kærar heilsanir omma, abbi og mammubeiggjarnir

Gó›a fitta Birita!
Hjartaliga tillukku vi› 7 ára fø›ingardegnum. Nú er dukkan blivin stór.
Heilsan abbi, omma og mostir

Gó›a Turi›
Hjartaliga tillukku vi› 1 ára degnum tann 14.5.
Ynskja mamma, babba, Teitur og Høgni



Tillukku vi› 40 ára degnum. Eitt sindur gráur, men tó enn knáur, troyttur eftir strævnan dag.
Ynskja starvsfelagarnir

Kære Olav!
Hjertelig tillykke med dagen.
Hilsen dagdriverbanden

T¿kk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum vi› gávum, blómum, fjarritum og hjálpsemi gjørdu hjúnabandsdag okkara tann 01.01.2000 so ríkan og minniligan.
Bina og Kári

Gó›a Linda
Hjartaliga tillukku vi› 4 ára degnum tann 9. mai. Eisini ein heilsan til Reidar, i› hev›i fø›ingardag tann 27. mars. Eg komi skjótt aftur at vitja tykkum.
Kærar heilsanir stórasysturin

nøvn nú 5 ferðir um vikuna 25,- kr.

GEVIÐ GÆTUR:
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr. pr. mynd í krossaðum kekki fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjalda í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.
Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: .....
.....
.....
.....
.....
.....

MYNDINA AFTUR: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur **(skal fyllast út).**
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Tíðindablaðið Sosialurin
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»NØVN NÚ«**